

## Høgni í Vejle

Fríggjadagin letur ein stór føroysk listaframsýning upp í Vejle í Danmark. Tað eru tríggir listafelagsskapir í býnum, sum í felag skipa fyri framsýningini, sum verður í trimum hølum ymsastaðni í býnum. Alment verður framsýningin latin upp í Vejle Kunstforening í hølunum hjá Kunstbrænderiet í Præstegyde 3, har borgarstjórin, Leif Skov, fer at seta framsýningina, og Høgni Hoydal, løgtings- og fólkatingsmaður fer at halda røðu.

## Leirvík veksur

Fólkatalið í Norðoyggjum er ikki vaksið, síðani Norðoyatunnilin kom. Hinvegin er fólkatalið hinumegin tunnilin vaksið hetta seinasta árið. Fyri einum ári síðani búðu 863 fólk í Leirvík, og nú á nýggjárinum vóru tey 873 ella 1,2 prosent fleiri í tali, skrivar kommunan á heimasíðuni. Sagt verður eisini, at eftirspurningurin eftir grundstykkjum er stórur, og at kommunan ætlar at útstykkja so mong grundstykkir sum gjørligt tey næstu árini.

# Loyvt at skeinkja uttandura

**Landstýrismaðurin við Vinnumálum hevur broytt kunngerðir um rúsdrekkasølu hjá hotellum og matstovum, nú er loyvt at skeinkja uttandura, umframt at matstovur og hotellir kunnu fáast mongdaravsláttur frá Rúsdrekkasølu Landsins.**

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialuri.fo*

Í vikuskiftinum bar Útvarpið tíðindi um, at nú ber til at skeinkja uttandura, og at matstovur og hotellir kunnu selja rúsdrekka út úr húsinum saman við tilgjørdum mati. Tað er Landstýrismaðurin við Vinnumálum, ið hevur broytt tvær kunngerðir, so matstovur og hotellir kunnu skeinkja uttandura, á avmarkaðum øki upp at staðnum.

Harumframt kunnu matstovurnar selja rúsdrekka út úr húsinum til móttøkur og veitslur saman við tilgjørdum mati, um vørurnar verða bílagdar eina viku frammanundan. Bjarni Djurholm. landsstýrismaður við Vinnumálum sigur, at hetta er eftir ynski frá vinnuni. Matstovur og hotellir skipa fyri veitslum, og í hesum sambandi hevur tað verið ynskiligt, at tey eisini sleppa at standa fyri innkeypinum av víni til matin.

Hin broytingin er somuleiðis bert galdandi fyri matstovur og hotellir. Frá 1. mai kann Rúsdrekkasøla Landsins geva teimum avsláttur, sum keypa nógv. Bjarni Djurholm, landstýrismaður við vinnumálum, sigur, at tey hava arbeitt við hesum málum leingi.

- Talan er í báðum førum um restriktivar broytingar. Vit hava vurdera hetta leingi og hava tosað við bæði vinnuna og Fyribyrgingarráðið, fyri at einki óskil skal vera í hesum, hava vit gjørt tað somikið restriktivt, greiðir Bjarni Djurholm frá.



*Bjarni Djurholm vísir á, at talan er um eina sera restriktiva broyting.*

Fyri at fáa loyvi at skeinkja úti skal søkjast um serligt skeinkiloyvi afturat tí vanliga. Áðrenn loyvisnevndin gevur hetta loyvið, skal tað ummælast hjá bæði kommunu og løgreglu. Hetta er fyri, at loyvini skulu vera til so lítlan bága sum til ber, sigur landstýrismaðurin.

- Lokalu myndugleikarnir hava best innlit í, hvussu hetta best kann gerast, sigur Bjarni Djurholm.

Hann sigur somuleiðis, at tey hava vent málinum í samgonguni.

- Talan er um eina sera avmarkaða víðking av skeinkiloyvum. Her er ikki talan um, at loyva ad hoc sølu av rúsdrekka út av húsinum, ella um at klubbar og ølstøð sleppa at víðka um søluna, sigur Bjarni Djurholm.

Hann væntar heldur ikki, at broytingin fer at merkja, at prísurin á rúsdrekka fer niður á matstovum, ístaðin verður møguleiki hjá matstovum at keypa dýrari vín, ella at fáa meira til raksturin.

Avsláttur in hjá matstovum skal sambært landsstýrismanninum fíggjast av lógarbundna yvirskotinum hjá Rúsdrekkasølu landsins.

Hetta er eisini tann leisturin, ið Elsa Maria Olsen, stjóri í Rúsdrekkasølu Landsins metir vera tann besta. Hann ætlar at taka málið upp í sambandi við eykajáttanina fyri mars, men tað er greitt, at fyrstu tíðina verður talan um avmarkaðan avsláttur. Men í sambandi við fíggjarlógina fyri 2008 verður málið tikið uppaftur til viðgerðar, tá skal lógarbundna yvirskotið endurskoðast alíkavæl, sigur Bjarni Djurholm.

# Gott at onkrir politikarar tora

**Leif Sørensen eigur matstovuna Gourmet, hann metir mongdaravsláttu rin í Rúsdrekka vera eitt neyðugt stig, og gleðist um dirvið hjá Bjarna Djurholm**

RÚSDREKKA

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Leif Sørensen eigari av matstovuni Gourmet hevur leingi eftirlýst, at keypsprísirnir av rúsdrekka varð lagaligari fyri matstovur og onnur. Hann er tí fegin um broytingina kunngerðini, ið ger, at Rúsdrekkasøla Landsins kann geva mongdaravsláttur til matstovur og hotellir, ið keypa stórar mongdir til víðari sølu.

- Tað er fantastiska gott, at onkrir politikarar eru, ið tora at gera tílíkar neyðugar broytingar, sigur Leif Sørensen.

Hann er spentur, at vita hvussu stóran avsláttur talan er um, tí at fyri, at hetta veruliga skal merkjast má talan sambært Leif vera um minst 20%.

- Nú vita vit ikki hvussu nógv % talan er um, men hetta kann vera við til at gera tað møguligt, at reka eina matstovu sum Gourmet í Føroyum, sigur Leif.

Leif Sørensen sigur, at prislækkanin ikki fer at merkjast á prísinum á víni, ið verður selt í Gourmet. Raksturin av eini matstovu, sum hansara í Føroyum er somikið tungur, at tað als ikki ber til, at seta prísin niður. Hann sigur, at hann ikki fær sagt, hvussu aðrar matstovur fara at gera, men hjá honum verður hetta bert eitt íkast til tann tunga raksturin.

*Leif Sørensen og Hans Andreassen eru samdir um, at talan er um góðar broytingar.*

mynd: Jens Kr. Vang




# Skapa mentan við fortovskafeum

**Hans Andreassen eigari av Glitnir metir møguleikan at skeinkja úti vera eitt gott høvi at skapa eina mentan við fortovskafeum.**

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Hans Andreassen eigur Glitnir, hann er sera fegin um, at tað nú fer at bera til at skeinkja uttandura.

- Vit hava bíða leingi eftir hesum, og tað er ødeliga gott. Nú summarið nærkast er hetta sera gott hjá matstovum. Vit kunnu fáa eina mentan við fortovskafeum, og tað er gott tá útlendingar koma hendan vegin. Vit eru spentir um hetta. Vit hava ein krók uttanfyri, har vit kunnu seta nøkur borð upp, greiðir Hans Andreassen frá.

Heldur ikki Hans væntar ikki, at broytingin í innkeypsprísinum hjá matstovum fer at ávirka prísin hjá viðskiftafólkinum.

- Um vit hyggja aðrastaðni, sum til dømis í Danmark, so er innkeypsprísurin har eisini broyttur uttan, at tað hevur ávirkað søluprísin. Hetta fer heldur at merkjast við, at meira verður eftir til rakstur. Vit fáa kanska ráð at skifta gólv eitt sindur oftari og at geva betur service, sigur Hans Andreassen.